ítróttur

Nr. 229 • hósdagur • 28. november 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Jóhannis aftur til Vágarnar

Mest sum allir smálutir eru avgreiddir, og sjálvur roknar Jóhannis Joensen við, at hann verður at síggja hjá FS Vágum komandi kappingarár

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Týsdagin skrivaðu vit, at Hans á Lag ikki verður við HB komandi kappingarár, og nú er tað mest sum víst, at Jóhannis Joensen verður at síggja í heimliga umhvørvinum vesturi á Vágoynni, tá fótbólturin fer á rull aftur

Í týsdagsblaði okkara vistu vit at siga, at HB-verjuleikarin, Hans á Lag, ikki verður við á liðnum komandi kappingarár. Og nú er líkt til, at HB eisini missir næsta týdningarmikla verjuleikaran á liðnum.

Jóhannis Joensen hevur seinastu seks árini verið fastur fúsur á besta liðnum hjá HB, umframt at hann mest sum alla tíðina hevur verið í landsliðshópinum. Sáttmálin hjá honum við HB rennur nú út, og alt bendir á, at hann nú vendir aftur til Vágarnar, har felagsliðið tykist hava munandi størri ætlanir í ár, enn etir so ofta áður hava havt.

- Enn er ikki alt avgreitt, men tað er so at siga víst, at eg fari at spæla við FS Vágum komandi ár. Ikki bara tí at hetta er ein møguleiki hjá mær at venda aftur til røturnar. Eg haldi sjálvur, at vágamenn koma at hava eitt sera spennandni lið komandi kappingarár, og tí vil eg gjarna verða ein partur av. Málið hesa ferð verður í øllum førum væl hægri, enn tað oftani hevur verið fyrr, og sjálvur haldi eg, at liðið hevur møguleika at blanda seg í kappingina í ovaru hálvu av stigatalvuni, sigur Jóhannis Joensen sjálvur.

Leita eftir avloysarum

Í HB eru tey sjálvsagt hørm um, at liðið soleiðis hevur mist tveir av grundstuðlunum í verjupartinum, men samstundis verður ásannað, at hetta eru treytirnar, sum føroysk fótbóltsfeløg mugu laga seg eftir.

- Tað er jú soleiðis í dag, at tú fyri tað mesta hevur sáttmálabundnar leikarar. Tá sáttmálin rennur út, so hevur tú onga trygd fyri, at leikararnir halda fram, sigur Birgir Enghamar, formaður í HB.

- Hinvegin er einki at ivast í, at tað er sera óheppið fyri okkum, at tað er tveir somikið týdningarmiklir leikarar í somu ketu, sum nú gevast í felagnum. Vit hava sjálvsagt ungar leikarar, sum standa til reiðar at taka við, men í fyrstu atløgu vildi tað vera ein sera stór byrða at lagt á hesar, um teir skuldu lyft arvin eftir tveimum somikið sterkum verjuleikarum.

Spurdur, um hetta merkir, at HB fer at styrkja um hópin við leikarum uttan ífrá til komandi kappingarár, sigur formaðurin, at tað fær hann enn ikki svarað fyri.

- Sjálvandi hava vit altíð eyguni opin fyri møguligum styrki til liðið. Tað rokni eg við, at øll feløg hava. Menm akkurát, hvat spyrst burturúr hesum, er ilt at siga. Løgmaður plagar at siga, at einki er liðugt, fyrr enn alt er liðugt, og tað haldi eg meg so eisini til í hesum føri, sigur Birgir Enghamar at enda.

Aftur B36-yvirskot

B36 hevði sum vant eitt fitt yvirskot í undanfarna roknskaparárið. Hesa ferð var úrslitið 340 tkr.

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Sum nevnt í blaðnum í gjár, so hevði B36 aðalfund týskvøldið. Umframt at tíðindini um leikaraskiftini, sum vit bóru í gjár, vórðu váttað á fundinum, so vóru eisini ymisk onnur mál á skránni. Millum annað skuldi ársroknskapurin leggjast fram.

Og sum vant kundi kassameistarin í felagnum, Kjartan Mohr, vísa á ein roknskap við fittum yvirskoti. Úrslitið fyri 2001/2002 gjørdist knappar 340 tkr., og við hesum er eginognin hjá felagnum komin upp á hálva fimtu mió kr. Av samlaðu ognunum á 5 mió kr. eru ikki minni enn 2 mió kr. innistandandi á bók, so hóast teir svørt /vítu ikki fingu so góð ítróttarlig úrslit í fjør, sum teir kundu hugsað sær, so høvdu tey í øllum førum eina góða figgjarstøðu at fegnast um.

Tveir nevndarlimir stóðu fyri afturvali, og vórðu bæði Jón Johansen og Jan Nielsen afturvaldi. Nevndin skipaði seg eftir fundin, og sær hon soleiðis út: Formaður er Kristjan á Neystabø, Jón Johansen er næstformaður, Kjartan Mohr er peningarøkil, Hannis Olsen er skrivari, og fimti nevndarlimurin er Jan Nielsen. Tiltakslimir eru Símun Midjord og Judith Eysturoy sum bæði eru nývald.

Íslendingar eftir føroyskum landsliðsleikarum

Í Grindavík eru teir ivaleysir í, at Jákup á Borg og Julian Johnsson vildu verið góður styrkur hjá felagnum at havt til komandi kappingarár

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Íslendska sjónvarpsrásin, Støð 2, visti týskvøldi at siga, at Grindavík, sum heldur til í bestu íslendsku fótbóltsdeildini, í løtuni roynir at fáa hendur á tveimum føroyskum landsliðsleikarum.

Sagt verður, at felagið hevur í hyggju at fáa Julian Johnsson og Jákup á Borg, sum báðir spæla í B36, við í hópin til komandi kappingarár.

Kristian á Neystabø, formaður í B36, sigur í stuttari viðmerking, at Grindavík hevur verið í sambandi við B36, men at hann í løtuni ikki dugir at siga, hvørt nakað spyrst burturúr hesum.

- Tað veldst um so nógv. Ikki minst, hvat leikararnir sjálvir vilja, men sum útgangsstøði rokna vit við, at talan hjá okkum verður um sama hóp sum í fjør, umframt teir tríggjar, sum vit nú hava fingið afturat.

Yvirhøvur heldur formaðurin í B36, at áhugin fyri føroyskum leikarum er vaksin seinastu tíðina.

- Tað var serliga eftir landsdystin í Týsklandi, at fyrispurningarnir vóru nógvir í tali, og feløg úr bæði Íslandi, Danmark, Onglandi og Fraklandi hava verið í samband við okkum. Seinastu vikurnar er hesin áhugin tó fjarðaður nakað, og í verandi løtu dugi eg als ikki at siga, hvørt nakað spyrst burtur úr øllum prátinum, sigur Kristjan á Neystabø at enda.

Landssjúkrahúsið
FO 100 Tórshavn

Á psyk **deild 2** eru hesi røktarstørv leys at søkja:

- Sjúkrarøktarfrøðingur í barnsburðafarloyvi frá 1. januar 2003 til 30. juni 2003 á starvsbrøki 0,7 í skiftandi vaktum
- Fast starv sum sjúkrarøktarfrøðingur frá 1. januar 2003 á starvsbrøki 0,5 í skiftandi vaktum. Møguleiki er tó fyri at arbeiða 0,8 tíð fram til 30 september 2004.

Deildin er ein akut viðgerðardeild. Á deildini starvast sjúkrasystrar, pleygarar og sosial- og heilsuatstøðingar. Deildin er ein áhugaverd deild við nógvum avbjóðingum. Vit leggja okkum eftir starvsfólkið er í støðugari menning og áhaldandi at betra um terapeutiska umhvørvið á deildini

Arbeitt verður eftir kontaktpersónaskipanini og miljøterapeutiskum meginreglum. Deildin hevur tætt samstarv við aðrar fakbólkar, so sum lækna, sálarfrøðing, ergo- og fysioterapeut. Saman eru vit eitt lið, sum er um hin einstaka sjúklingin.

Setanartreytir:
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Upplýsingar um starvið:
Meira um størvini fæst at vita um við at venda sær til Birgit Andersen, deildarsjúkrarøktarfrøðing D2 tlf. 313540, lokal 422 ella til Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 351, ella e-mail: bergitw@ahs.fo.

Umsóknarfreistin er 19. desember 2002 kl. 12.00.

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

Landssjúkrahúsið
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

Mentanargrunnur Landsins
Starvslønir til listaligt og mentanarligt arbeiði

Starvslønir verða latnar umsøkjarum við støði í listaligum og fakligum metingum av verkevni ella verkætlan.

"Endamál grunsins er at styðja starv fyri føroyskum máli, bókmentum, list, vísindum og øðrum mentanarmálum bæði hjá leikum og lærdum.
Grunnurin skal serliga stuðla tiltøkum og verkætlanum, sum kveikja og menna føroyska myndlist, tónlist, bókmentir, sjónleik og aðra list, sum kann javnmetast við hesar listagreinir."

Starvsløninrnar kunnu verða latnar soleiðis:
1 starvsløn galdandi í 3 ár
og
starvslønir galdandi í 1 mánað til 12 mánaðir

Upphæddin á starvsløninni svarar til læraralønina á fólkaskúlans lønarstigi 21, stigi 1, sum eftir 1. mars 2003 verður kr. 20.073,58 um mánaðin.

Umsóknir skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 21. februar 2003

Umsóknarblað fáast frá Mentanargrunni Landsins
Tórgarðsgotu 42 - FO-100 Tórshavn
Tlf. 32 08 42 - fartlf. 21 80 13 - fax 31 19 98 - teldupostur: mentan@post.olivant.fo

Lýsið
við
brúktum
bilum





MÓTTØKA · Á · REPROZ
Í sambandi við stjóraskiftið, verður bjóðað til móttøku í hølum okkara á Grønlandsvegi 38, friggjadagin 29. november frá 15 til 17. Øll viðskiftafólk eru hjartaliga vælkomin.

REPROZ
SKAPANDI LOYSNIR

Jólasølan
hjá Føroya Heimavirkisfelag verður
í Badmintonhøllini leygardagin 30. november
frá kl. 10.00 - 20.00 og
sunnudagin 1. desember frá kl. 14.00 - 19.00.

Verið vælkomin

Umb.
F. H. Mikala G. Macdonald
Box 336

Havnar Bio

Søkt verður eftir fólki

Havnar Bio

Sosialurin